# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Modernaður retrobilur

**Bilurin sum nógv hava bíða eftir í longri tíð er nú komin. Talan er um Fiat 500, sum er ein nýggjur minibilur, ið er gjørdur við Fiat 500 frá 1957 sum fyrimynd**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fiat eru nú við í kappingini um modernaðar retrobilar sum t.d. VW New Beetle og Mini. Fiat 500 er gjørdur við Fiat 500 frá 1957 sum fyrimynd.

Bilurin fekk fimm stjørnur og fult stigatal í EuroNCAP krasjtestunum, sum er flott fyri ein bil í miniklassanum.

Fiat 500 fæst við tveimum bensinmotorum: 1,2 litra við 69 hk og 1,4 litra við 100 hk og einum 1,3 litra dieselmotori við 75 hk. Allir motorarnir eru økonomiskir og umhvørvisvinarligir.

Bæði uttan og innan líkist Fiat 500 originalmodellinum frá 1957 við setrum og instrumentborði í modernaðum retrostýli.

Fiat 500 kostar úr 145.000 krónum.

Jens Petur Jensen frá Nordcar sigur, at teir hesa og næstu vikuna hava fleiri góð tilboð við bæði nýggjum og brúktum bilum. Umframt nakrar útvaldar nýggjar bilar hava teir eisini fleiri brúktar bilar, sum verða seldir við stórum avsláttri.




*Jens Petur Jensen frá Nordcar við nýggja modernaða retrobilinum Fiat 500*



*Innan er Fiat 500 í modernaðum retrostíli*




*Fiat 500 við 1,4 litra bensinmotori við 100 hk*

# Spennandi crossover frá Saab

**Saab sýndu fram ein heilt nýggjan konseptbil á bilaframsýningini, sum var í Detroit í januar. Talan var um Saab 9-4X BioPower Concept, sum eftir ætlan verður tann fyrsti sonevndi crossover frá Saab**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Saab 9-4X BioPower Concept hevði premieru á bilaframsýningini í Detroit í USA.

Bilurin er tann fyrsti sonevndi crossover frá Saab, sum er ein blandingur av einum vanligum persónbili og SUV. Saab 9-4X hevur smart design við framkomnari 4x4 teknologi, sum eisini er at finna í Saab 9-3.

2,0 litra BioPower motorurin hevur 300 hk og eitt botntrekk upp á 400 Nm. Brennievnið er E85, sum er ein blanding við 85 prosentum av ethanol og 15 prosentum av bensini. Dálkingin frá útstoytunum á hesum bilum er upp til 70 prosent minni enn á vanligum bilum.

Designið líkist konseptbilinum Saab Aero X frá 2006, og hesin konseptbilurin er gjørdur fyri at vísa, hvussu ein komandi Saab crossover væntandi kemur at síggja út. Einki verður tó sagt um, nær bilurin kemur á marknaðin.



*Saab 9-4X BioPower Concept er ein crossover við eyðkendum Saab stíli*



*Innan sær er Saab 9-4X BioPower Concept rættuliga framkomin út*